## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Hvassur vindur ella skrið av landsynningi, seinnapartin nakað minni vindur. Regn ella mjørki av og á og hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, seinnapartin minni vindur. Sólglottar, men eisini okkurt ælið og hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi, seinnapartin upp í skrið av landnyrðingi. Fyrrapartin yvirhøvur turt og sólglotttar, men seinnapartin regn. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin skrið ella stormur av landnyrðingi, seinnapartin minni vindur. Týsdagin upp í ein strúk av landnyrðingi. Ælingur og hitin millum 5 og 9 stig.

# Klárt til stóra gildið

**Nú er greitt, hvussu Frændur fara at halda sín 25 ára dag, tá ið teir eisini geva nýggja fløgu út**

TÓNLEIKUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Frændur kunnu í ár halda silvurbrúdleyp, og tað skal gerast við stórari konsert í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn, tá Frændur eisini geva nýggja fløgu út.

Føðingardags- og útgávukonsertin verður leygarkvøldið 21. november, og nú er greitt, hvussu Frændur ætla at halda stóra gildið.

Kvøldið byrjar klokkan 22, tá ið matstovan Etika fer at bjóða sushi. Klokkan 23 fer Sámal Ravnsfjall á pallin at spæla nakrar av sínum kendu sangum.

Á midnátt fara Frændur at hava útgávukonsert, har teir spæla sangir av nýggju útgávuni, sum verður latin almenninginum sama dag.

Eftir tað fer Hanus G. Johansen at syngja og spæla.

Kvøldið endar við, at Frændur koma aftur á pallin, og tað stendur stóra hittparadan hjá teimum á skránni. Teir fara at spæla tað besta frá teimum 25 árum, teir hava verið virknir, og spurningurin er bara, um teir náa allar sangirnar, áðrenn kvøldið eftir ætlan skal enda klokkan 4.



*Frændur gera seg nú klárar til stóra føðingardagin, sum teir halda í næsta mánaði*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 14 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 9 |
| Oslo | --- |
| Stokkhólm | 6 |
| Keypmannah. | 8 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | 10 |
| Berlin | 8 |
| Warzawa | 12 |
| Kiev | 14 |
| Bukarest | 20 |
| Paris | 14 |
| Madrid | -- |
| Róm | -- |
| Malorca | -- |
| Athen | 23 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 25 |
| Beijing | 22 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 25 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | -- |
| New York | 11 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 17 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 18 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 977 hPa. í útsynning sunnan úr Íslandi fer vestureftir og dýpist.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið vestan fyri Írland fer norðureftir og dýpist. Brúgvalagið haðani kemur móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 23/10 kl. 06[00] – 24/10 06[00]. Hitin í gjár: 10,1°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° -
Mesti hiti máldur í oktober: +18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 12/10 kl. 06[00] – 13/10 06[00].
Avfallið higartil í oktober: 166 mm



Forelskað?

Vís tað í Sosialinum

javni

– Virkin og virðismikil

www.javni.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

25. oktober — Mánin longst frá jørðini
26. oktober — Fyrra kvarter
2. november — Fullmáni
7. november — Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 29. okt | 03:03 | 15:21 | 02:03 | 14:21 | 02:18 | 14:36 | 05:03 | 17:21 | 06:03 | 18:21 | 01:18 | 13:36 | 00:18 | 12:36 | 03:18 | 15:36 | 04:18 | 16:36 | 02:48 | 15:06 | 04:03 | 16:21 |
| 30. okt | 03:39 | 15:57 | 02:39 | 14:57 | 02:54 | 15:12 | 05:39 | 17:57 | 06:39 | 18:57 | 01:54 | 14:12 | 00:54 | 13:12 | 03:54 | 16:12 | 04:54 | 17:12 | 03:24 | 15:42 | 04:39 | 16:57 |
| 31. okt | 04:16 | 16:35 | 03:16 | 15:35 | 03:31 | 15:50 | 06:16 | 18:35 | 07:16 | 19:35 | 02:31 | 14:50 | 01:31 | 13:50 | 04:31 | 16:50 | 05:31 | 17:50 | 04:01 | 16:20 | 05:16 | 17:35 |
| 1.nov | 04:55 | 17:16 | 03:55 | 16:16 | 04:10 | 16:31 | 06:55 | 19:16 | 07:55 | 20:16 | 03:10 | 15:31 | 02:10 | 14:31 | 05:10 | 17:31 | 06:10 | 18:31 | 04:40 | 17:01 | 05:55 | 18:16 |
| 2.nov | 05:37 | 17:57 | 04:37 | 16:57 | 04:52 | 17:12 | 07:37 | 19:57 | 08:37 | 20:57 | 03:52 | 16:12 | 02:52 | 15:12 | 05:52 | 18:12 | 06:52 | 19:12 | 05:22 | 17:42 | 06:37 | 18:57 |